# A V G E R Ð

til

spurning eftir § 6, stk. 2, í lóg um heimastýri Føroya,

sum Føroyra landsstýri og ríkisstjórnin hava spurt.

**Tá nevndin varð sett**

Í felags áheitan frá 10. januar 2025 til hægstarættarforsetan heittu løgmaður og forsætisráðharrin á nevndina eftir § 6, stk. 2, í lóg um heimastýri Føroya um at avgera soljóðandi spurning:

> "Er limaskapur Føroya í egnum navni í World Trade Organization (WTO) sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya?"

29. januar 2025 vórðu nevndarlimirnir valdir. Ríkisstjórnin valdi Anders Sparholt Jørgensen, deildarstjóra á lógadeild danska løgmálaráðsins, og Vibeke Pasternak Jørgensen, stjóra fyri løgfrøðiligari tænastu í danska uttanríkismálaráðnum. Føroya landsstýri valdi Bjørn Kunoy, dr., sendimann Føroya í Washington D.C., og Sjúrð Rasmussen, løgfrøðiligan ráðgeva á løgmansskrivstovuni. Hægstarættarforsetin Jens Peter Christensen valdi seg sjálvan til nevndarformann og hægstarættardómara Lars Hjortnæs og hægstarættardómara Jens Kruse Mikkelsen til nevndarlimir.

**Nevndararbeiðið**

*Fyrsti nevndarfundur og ætlanin fyri nevndararbeiðið*

4. februar 2025 boðaði nevndarformaðurin til fyrsta nevndarfund, sum skuldi haldast 28. mars 2025 í Hægstarætti. Dagsskrá og ætlan fyri nevndararbeiðið vórðu hjáløgd fundarboðunum.

Í hjáløgdu dagsskrá stóð m.a., at á fundinum fóru teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir at greiða frá sjónarmiðum sínum um hetta trætumálið og frá svari sínum til spurningin, sum varð lagdur fyri nevnd, eitt nú hvat teir hildu, at ein føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO fór at hava við sær løgfrøðiliga av rættindum og skyldum. Síðan skuldi umrøðast, hvørt til bar at finna semju millum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnar.

Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir blivu í dagsskránni bidnir um í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin at senda viðkomandi tilfar og eitt upprit, ið tók samanum frágreiðing teirra um svarið til spurningin, ið varð lagdur fyri nevnd.

Í hjáløgdu ætlan fyri nevndararbeiðið stóð m.a. (í føroyskari týðing):

> “Fyrsti nevndarfundur (fríggjadagin tann 28. mars 2025) fer at taka støði í tilfarinum, sum umboðini fyri Føroya landsstýri og umboðini fyri ríkisstjórnina (eftir hetta róptir “partarnir”) hava sent nevndarformanninum í seinasta lagi 14 dagar fyri fundin. Á fundinum greiða partarnir munnliga frá sjónarmiðum sínum við støði í skrivliga tilfarinum, nevniliga samanumtakandi uppritunum, sum partarnir hvør í sínum lagi hava gjørt. Dómararnir kunnu spyrja nágreinandi spurningar, royna at fáa ivamál lýst gjøllari o.a. Fundurin verður hildin í Hægstarætti.
>
> Eftir eyka umhugsanartíð verður annar nevndarfundur hildin fyrst í mai ella miðjan mai. Fyri fundin ber til at senda meira skrivligt tilfar, t.d. samanumtakandi upprit í broyttum líki. Á fundinum greiða partarnir frá sjónarmiðum sínum við støði í málstilfarinum, ið tá er til taks. Dómararnir kunnu aftur spyrja nágreinandi spurningar, royna at fáa ivamál lýst gjøllari o.a. Fundurin verður hildin í Tórshavn.
>
> Triði nevndarfundur verður hildin miðjan juni ella síðst í juni. Um partarnir semjast á fundinum, er málið soleiðis avgjørt, sbrt. § 6, stk. 2, 2. pkt., í lóg um heimastýri Føroya. Um so ikki er, skulu teir tríggir hægstarættardómararnir avgera málið, sbrt. § 6, stk. 2, 3. pkt. Fundurin verður hildin í Hægstarætti.”

Fyrsti nevndarfundur varð hildin tann 28. mars 2025 í kærumálssalinum hjá Hægstarætti.

Á fundinum greiddu fyrst teir av ríkisstjórnini og harnæst teir av landsstýrinum valdu limirnir frá sjónarmiðum sínum um málið í samsvari við samanumtakandi uppritini. Síðan var eitt annað umfar, har framløgurnar hjá teimum av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limunum snúðu seg um sjónarmiðini hjá hvørjum øðrum. Meðan framløgurnar vóru, spurdu hægstarættardómararnir nágreinandi spurningar til báðar partar.

*Annar nevndarfundur*

Annar nevndarfundur varð hildin tann 2. mai 2025 á Hotel Hafnia í Tórshavn.

Fyri fundin hevði nevndarformaðurin tann 3. apríl 2025 orsakað av orðaskiftinum á fyrsta nevndarfundi sent teimum av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limunum tveir spurningar at taka støðu til. Fyrsti spurningur snúði seg um, hvørt tað hevði verið sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya, um Føroyar blivu limir í egnum navni í WTO við støði í ítøkiligari heimild, møguliga saman við einari fólkatingsavgerð, so Fólkatingið hevði givið samtykki til tess. Hin spurningurin var, um ein listi kundi gerast yvir føri, har Føroyar síðan 2005 sbrt. § 4 í lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera eru vorðnar limur í egnum navni í einum millumtjóðafelagsskapi, ið loyvir øðrum eindum enn ríkjum og felagsskapum av ríkjum at fáa

limaskap í egnum navni, og um har vóru føri, har hetta er hent áðrenn 2005 við støði í ítøkiligari heimild.

Á fundinum greiddu fyrst teir av ríkisstjórnini og harnæst teir av landsstýrinum valdu limirnir frá sjónarmiðum sínum um málið og um spurningarnar frá nevndarformanninum. Síðan var orðaskifti millum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnar. Hægstarættardómararnir spurdu nágreinandi spurningar til báðar partar, meðan orðaskiftið var.

Avtalað varð á fundinum, at fyri triðja nevndarfund skuldu teir av ríkisstjórnini valdu limirnir senda eitt upprit við framhaldi sínum av orðaskiftinum.

*Triði nevndarfundur*

Triði nevndarfundur varð hildin tann 2. juni 2025 í kærumálssali Hægstarættarins.

Fyri fundin høvdu teir av ríkisstjórnini valdu limirnir tann 19. mai 2025 sent eitt upprit sum framhald av orðaskiftinum á øðrum nevndarfundi. Avtalað varð áðrenn triðja nevndarfund, at teir av landsstýrinum valdu limirnir fóru at gera viðmerkingar til uppritið á triðja fundinum.

Á fundinum greiddu fyrst teir av ríkisstjórnini valdu limirnir frá uppritinum, ið var sent nevndini tann 19. mai 2025. Síðan greiddu teir av landsstýrinum valdu limirnir frá sjónarmiðum sínum viðvíkjandi uppritinum. Hetta legði støði undir orðaskiftið aftaná millum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnar. Ímeðan spurdu hægstarættardómararnir nágreinandi spurningar til báðar partar.

Við støði í einum uppkasti til eina heildarlýsing, sum nevndarformaðurin hevði sent undan fundinum, umrøddu teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir, hvat "føroyskur limaskapur í egnum navni í World Trade Organization (WTO)" hevur við sær. Úrslitið av orðaskiftinum varð, at teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir samdust um eina heildarlýsing av hesum.

Ósemjan, ið síðan var eftir millum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnar, var, hvørt ein slíkur limaskapur er "sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya."

Avtalað varð, at teir av landsstýrinum valdu limirnir skuldu skrivliga senda nevndini sjónarmið síni um hetta, soleiðis sum sjónarmiðini góvu seg til sjóndar á fundinum, og at teir av ríkisstjórnini valdu limirnir skuldu gera skrivligar viðmerkingar til hesi sjónarmið. Harafturat varð avtalað, at teir landsstýrinum valdu limirnir skuldu fáa høvi at gera skrivligar viðmerkingar til sjónarmiðini hjá teimum av ríkisstjórnini valdu limunum.

Brævaskiftið millum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnar endaði tann 9. juli 2025.

Eftir hetta stóð tað til teir tríggjar hægstarættardómararnar, sbrt. § 6, stk. 2, 3. pkt., í heimastýrislógini, at avgera spurningin, sum varð lagdur fyri nevnd.

**Rættargrundarlag**

§ 1 í grundlógini er soljóðandi:

> "Denne grundlov gælder for alle dele af Danmarks rige."

§ 19 í grundlógini ljóðar soleiðis:

> "Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender. Uden folketingets samtykke kan han dog ikke foretage nogen handling, der forøger eller indskrænker rigets område, eller indgå nogen forpligtelse, til hvis opfyldelse folketingets medvirken er nødvendig, eller som iøvrigt er af større betydning. Ejheller kan kongen uden folketingets samtykke opsige nogen mellemfolkelig overenskomst, som er indgået med folketingets samtykke.
> *Stk. 2.* Bortset fra forsvar mod væbnet angreb på riget eller danske styrker kan kongen ikke uden folketingets samtykke anvende militære magtmidler mod nogen fremmed stat. Foranstaltninger, som kongen måtte træffe i medfør af denne bestemmelse, skal straks forelægges folketinget. Er folketinget ikke samlet, skal det uopholdeligt sammenkaldes til møde.
> *Stk. 3.* Folketinget vælger af sin midte et udenrigspolitisk nævn, med hvilket regeringen rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenrigspolitisk rækkevidde. Nærmere regler om det udenrigspolitiske nævn fastsættes ved lov."

Í 2005 samtyktu Løgtingið og Fólkatingið einsljóðandi lógir um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera.

§ 4 í føroysku løgtingslóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera ljóðar soleiðis:

> "Eftir áheitan frá Føroya landsstýri kann Danmarkar stjórn samtykkja at lata inn umsókn um limaskap Føroya, ella stuðla slíkari, í millumtjóðafelagsskapum, ið loyva øðrum eindum enn ríkjum og felagsskapum av ríkjum limaskap í egnum navni, tá ið tað er sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya."

Orðaljóðið í § 4 í føroysku lógini samsvarar við donsku týðingina av orðaljóðinum í § 4 í donsku lov nr. 579 af 24. juni 2005 om Færøernes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler, sum er endurgivin niðanfyri.

Í almennu viðmerkingunum í uppskotinum til føroysku lógina (Løgtingsmál nr. 95/2004: Uppskot til lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera, síða 3) stendur m.a.:

> "Vinningur Føroya av § 1, § 2, § 3 og § 4 í uppskotinum í mun til § 8 í heimastýrislógini er niðanfyristandandi:
>
> ...
>
> Føroyar kunnu í ávísum førum í egnum navni fáa limaskap og atlimaskap í millumstjóðafelagsskapum, tá ið slíkir felagsskapir eftir egnum samtyktum loyva tí, og tá ið tað er í samsvari við stjórnarskipanarligu støðu Føroya. Higartil hevur einans Danmarkar kongsríki kunnað søkt um slíkan limaskap ella atlimaskap fyri Føroyar. Nú kunnu Føroyar sjálvar søkja sær limaskap. Eftir § 1 kunnu Føroyar luttaka sum limur í millumtjóðafelagsskapum í navni Danmarkar kongsríkis, har ið Danmark er ikki limur. Eftir § 4 kunnu Føroyar tó luttaka sum limur *í egnum navni*, uttan mun til um Danmark er limur."

Í serligu viðmerkingunum til § 4 í uppskotinum til føroysku lógina (ibid., síða 6) stendur m.a.:

> "Í hesi grein er ásett, at Føroyar kunnu gerast limir ella atlimir í millumtjóðafelagsskapum í egnum navni, í førum, har ið millumtjóðafelagsskapir loyva, at aðrar eindir enn ríki og felagsskapir av ríkjum kunnu fáa limaskap ella atlimaskap í egnum navni. Eftir áheitan frá Føroya landsstýri kann Danmarkar stjórn samtykkja at lata inn umsókn um limaskap ella atlimaskap Føroya, ella stuðla føroyskari umsókn um sama, tá ið tað er í samsvari við stjórnarskipanarligu støðu Føroya."

§ 4 í donsku lov nr. 579 af 24. juni 2005 om Færøernes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler ljóðar soleiðis:

"Hvor internationale organisationer åbner adgang for, at andre enheder end stater og sammenslutninger af stater kan opnå medlemskab i eget navn, kan regeringen efter anmodning fra Færøernes landsstyre beslutte at indgive eller støtte en ansøgning herom for Færøerne, hvor dette er foreneligt med Færøernes forfatningsmæssige status."

Í almennu viðmerkingunum í uppskotinum til donsku lógina (Folketingstidende 2004-05 (2. samling), tillæg A, lovforslag nr. L 171, síða 7969 f.) stendur m.a. (í føroyskari týðing):

"*2.2. Ríkisrættarligar viðmerkingar*
Ríkisstjórnin hevur hesar viðmerkingar viðvíkjandi ríkisrættarligu kørmunum á fulltrúini.

§ 19, stk. 1 og 3, í grundlóg Danmarkar ríkis ljóðar soleiðis:

...

Eins og § 19, stk. 1, í grundlóg Danmarkar ríkis sigur, virkar kongurin (ríkisstjórnin) ríkisins vegna í millumtjóðamálum. Hetta merkir, at einstakir partar av ríkinum fara ikki sambært grundlógini at kunna fáa sjálvstøðugan myndugleika í hesum málum.

Tað hevði tískil havt grundlógarbroyting sum fyritreyt, um Føroyar ríkisrætttarliga skuldu fáa loyvi at virka egna vegna í millumtjóðamálum.

Spurningurin er so, hvørt tað stjórnarskipanarliga ber til hjá Føroyum at virka ríkisins vegna í ávísum millumtjóðamálum. Til hetta eru hesar viðmerkingar:

Við at virka ríkisins vegna fer føroyska landsstýrið at binda alt ríkið, soleiðis at avgerðir á uttanríkispolitika økinum sum útgangsstøði fara at ávirka heildaruttanríkispolitisku viðurskifti ríkisins. M.a. fer møguligur spurningur um altjóðarættarliga ábyrgd fyri ikki at hava hildið altjóðarættarligan sáttmála, sum Føroyar hava gjørt, at draga danskar myndugleikar uppí.

Her skilir uttanríkispolitikkur seg avgerandi frá teimum økjum, har føroyskir myndugleikar hava lóggávu- og umboðsvald, tí tá er bert vald til áseta reglur o.a. við gildi í Føroyum.

Grundlóg Danmarkar ríkis fer tí at vera til hindurs fyri, at heimildir veruliga verða fluttar føroyskum myndugleikum til at virka í teimum millumtjóðamálum, ið áðurnevnda § 19, stk. 1, í grundlógini fevnir um. Ein avleiðing av hesum má harafturat metast at vera, at tað fer ikki at bera til at lata føroyskum myndugleikum heimild at áseta reglur á uttanríkispolitiska økinum. Grundlógin verður sostatt m.a. til hindurs fyri, at heimilað verður føroyskum myndugleikum at lóggeva um viðurskifti hjá uttanríkistænastuni, at stovna diplomatiskar missiónir uttanlands ella at loyva onkrum at stovna slíkar missiónir í Føroyum.

Tað kann kortini bera til innan fyri grundlógarkarmarnar at heimila føroyska landsstýrinum at virka ríkisins vegna í ávísum millumtjóðamálum, sum einans viðvíkja Føroyum og ikki samstundis øðrum pørtum av ríkinum.

At heimildin einans fer at kunna fevna um viðurskifti, ið viðvíkja Føroyum, má í fyrsta lagi bera við sær, at heimildin til at virka ríkisins vegna í millumtjóðamálum skal vera avmarkað til tey málsøki, har føroyska landsstýrið hevur yvirtikið lóggávu- og umboðsvald – tað merkir málsøki, har landsstýrið sjálvt kann fremja neyðugu lógarbroytingarnar og umsitingarligu stigini o.a. í sambandi við altjóðarættarliga sáttmálagerð.

Í øðrum lagi merkir tað omannevnda, at altjóðarættarligu sáttmálarnir, ið føroyska landsstýrið ger ríkisins vegna, við støði í nevndu heimild kunnu bert hava Føroyar sum gildisøki.

Sum nevnt verður ikki talan um, at heimildir veruliga verða fluttar føroyskum myndugleikum til at virka í millumtjóðamálum. Ríkisstjórnin fer tí framvegis at hava uttanríkispolitiskan myndugleika eisini í teimum málum, sum heimildin til føroyska landsstýrið fevnir um.

Atlitið at ríkiseindini og § 19 í grundlógini ber harafturat við sær, at Føroya landsstýri í uttanríkispolitisku avgerðum sínum – ið sum nevnt gerast altjóðarættarliga bindandi fyri alt ríkið – fær ikki gjørt ímóti áhugamálum ríkisins, m.a. heildaruttanríkispolitikki ríkisins.

Føroya landsstýri fer sostatt ikki at kunna taka uttanríkispolitisk stig, sum eru í andsøgn við áhugamálini hjá hinum ríkispørtunum – eitt nú gera sáttmálar í ósamsvari við almennar meginreglur fyri uttanríkispolitikk ríkisins á ávísa málsøkinum.

Fyri at tryggja samsvar við heildaruttanríkispolitikk ríkisins fer ein fulltrúarskipan til Føroya landsstýri at virka ríkisins vegna í millumtjóðamálum at hava sum fyritreyt, at stovnað verður ein skipan til tess at tryggja, at ríkisstjórnin í neyðugan mun fær kunning og verður spurd um ráð áðrenn stig á uttanríkispolitiska økinum."

Í viðmerkingunum í lógaruppskotinum til § 4 í donsku lógini (ibid., síða 7974 f.) stendur m.a. (í føroyskari týðing):

"Ásetingin í § 4 snýr seg um tey serligu føri, har millumtjóðafelagsskapir loyva øðrum eindum enn ríkjum og felagsskapum av ríkjum at fáa limaskap í egnum navni. Hetta fevnir í høvuðsheitum um atlimaskap, sum ofta eru galdandi fyri øki handan hav, har eitt limaland hevur uttanríkismál teirra í hondum. Sum skilst á ásetingini í § 4 er ríkisstjórnin sinnað til í ítøkiligum førum – eftir vilja hjá og í samstarvi við føroyska landsstýrið – at kanna ítøkiligu møguleikarnar fyri føroyskum limaskapi í egnum navni í millumtjóðafelagsskapum, sum loyva øðrum eindum enn ríkjum og felagsskapum av ríkjum, og um so er, at stuðla slíkum vilja, tá ið tað er sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya."

**Sjónarmið hjá teimum av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limunum**

Eins og tað stendur í brotinum um nevndararbeiðið, hava teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir sum liður í nevndararbeiðinum greitt frá sjónarmiðum sínum um spurningin skrivliga

við at senda upprit og annað tilfar og munnliga á nevndarfundunum. Samstundis hava hægstarættardómararnir spurt nágreinandi spurningar bæði skrivliga og munnliga á fundunum.

Samanumtikið er sjónarmiðið hjá teimum av landsstýrinum valdu limunum, at føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO má metast at vera sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya. Tað er samanumtikið sjónarmiðið hjá teimum av ríkisstjórnini valdu limunum, at ein slíkur limaskapur má metast at vera ósambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya.

Eftir avtalu millum nevndarlimirnar verða tær frágreiðingar, sum teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir sum liður í nevndararbeiðinum hava givið um sjónarmið síni, ikki í aðrar mátar endurgivnar í hesi avgerð.

**Avgerð hægstarættardómaranna**

Sbrt. § 6, stk. 2, í lóg um heimastýri Føroya varð heitt á nevndina um at avgera soljóðandi spurning:

> "Er limaskapur Føroya í egnum navni í World Trade Organization (WTO) sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya?"

Tað stendur í § 6, stk. 2, 2. pkt., í heimastýrislógini, at eru teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir samdir, er málið endaliga avgjørt. Um so ikki er, skulu teir tríggir hægstarættardómararnir avgera málið, sbrt. 3. pkt. í ásetingini.

Eins og nevnt omanfyri eru teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir samdir um, hvat "føroyskur limaskapur í egnum navni í World Trade Organization (WTO)" ber við sær, sbrt. § 6, stk. 2, 2. pkt., í heimastýrislógini. Av tí at teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir eru ikki samdir um, hvørt ein slíkur limaskapur er "sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya", stendur tað til teir tríggjar hægstarættardómararnar at avgera hetta, sbrt. § 6, stk. 2, 3. pkt., í heimastýrislógini.

*Føroyskur limaskapur í egnum navni í World Trade Organization*

Eins og lýst omanfyri varð staðfest á nevndarfundi tann 2. juni 2025, at teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir eru samdir um, hvat "føroyskur limaskapur í egnum navni í World Trade Organization (WTO)" ber við sær, og teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir

blivu á fundinum samdir um eina heildarlýsing av hesum. Lýsingin er soljóðandi (í føroyskari týðing):

> "Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir eru samdir um, at "føroyskur limaskapur í egnum navni í World Trade Organization (WTO)" ber við sær, at Føroyar gerast sjálvstøðugur limur í WTO sum sjálvstøðugt tollumveldi, og at eftir hetta fara Føroyar í WTO at vera javnsettar við hinar limirnar í WTO, m.a. Danmark. Tað merkir, at Føroyar í tí førinum innlimast í WTO við teimum rættindum og skyldum, sum koma av støðu Føroya sum sjálvstøðugt tollumveldi í WTO.
>
> Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir hava upplýst m.a., at WTO loyvir øðrum eindum enn ríkjum at fáa fullan limaskap (sbrt. grein XII, stk. 1, í stovningarsáttmálanum fyri WTO). Ein limur í WTO skal hava rættarstand og venju í búskapar- og handilspolitikki, ið lúka krøvini í sáttmálunum hjá WTO. Skilt verður ikki ímillum ríki og sjálvstøðug tollumveldi í WTO. Ríki og sjálvstøðug tollumveldi hava t.d. sama atkvøðu- og talurætt sbrt. reglunum hjá WTO. Til at loysa trætumál hevur WTO eina trætuskipan, sum hevur málsførleika í trætumálum um rættindi og skyldur hjá limum í WTO. Tað eru einans ríkið ella einans tollumveldið, ið kunnu klagast fyri trætuskipanini og fáa eina avgerð um seg, ið ráðið fyri trætuskipanini samtykkir grundað á álit frá einari nevnd ella frá kæruráðnum. Tað eru einans ríkið ella einans tollumveldið, sum kunnu ábyrgjast. Ríkið, ið eitt klagað tollumveldi er partur av, ella tollumveldið, sum er partur av einum klagaðum ríki, gerast sostatt ikki partar av trætumálinum í WTO. Trætuskipanin hjá WTO hevur ikki somu eyðkenni sum ein altjóða dómsstólur ella gerðarrættur. Avgerðir millum limir í skipanini hjá WTO hava ikki rættarvirknað uttan fyri skipanina hjá WTO. Tað ber ikki til sambært reglunum hjá WTO at taka ella handhevja avgerðir uttan fyri skipanina hjá WTO, t.d. í einum altjóða dómsstóli.
>
> Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir hava harafturat upplýst m.a. – treytað av at Føroyar hava yvirtikið viðkomandi málsøki – at altjóðarættarliga fer einki at vera til hindurs fyri, at Føroyar gerast limur sum sjálvstøðugt tollumveldi í WTO, um ein slíkur limaskapur er sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya, og at føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO fer ikki at hava týdning fyri rættindi og skyldur Danmarkar sum limur í WTO ella í aðrar mátar stjórnarskipanarligu støðu Danmarkar, eitt nú samband Danmarkar til onnur ríki og millumtjóðafelagsskapir."

Spurningurin er so, um føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO er "sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya."

*Sambæri við stjórnarskipanarligu støðu Føroya*

*§ 1 í grundlógini*

§ 1 í grundlógini ljóðar: "Denne grundlov gælder for alle dele af Danmarks rige."

Tað stendur í forarbeiðunum til ásetingina (Forfatningskommissionens betænkning nr. 66/1953, síða 28), at § 1 í grundlógini, sum ikki var í undanfarnu grundlóg, kom í lag í sambandi við broytingina í stjórnarskipanarligu støðu Grønlands, sum grundlógaruppskotið elvdi til, har øll grundlógin fekk gildi í Grønlandi. Ásetingin elvdi ikki til broytingar í stjórnarskipanarligu støðu Føroya.

§ 1 í grundlógini staðfestir sum nevnt, at grundlógin er galdandi fyri allar partar av Danmarkar ríki. Ásetingin ásetir ikki eina rættareind skilt á tann hátt, at løggávan skal vera eins í øllum ríkinum, og ásetingin verður ei heldur mett at vera til hindurs fyri, at stovnað verður eitt sera víðfevnt, føroyskt heimastýri, sí nærri niðanfyri.

*Føroyska heimastýrisskipanin*
Sbrt. § 1 í lóg nr. 11 frá 31. mars 1948 um heimastýri Føroya (lov nr. 137 af 23. marts 1948 om Færøernes hjemmestyre) eru Føroyar sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum samsvarandi hesi lóg, og innanfyri ríkismarki taka Føroyingar við fólkavalda løgtingi sínum og einum av tinginum stovnaðum landastýri ræði yvir føroyskum sermálum sum í hesu lóg ásett. Eftir § 2, sí lista A, verða nøkur mál og málsøki at rokna sum føroysk sermál, ið heimastýrið kann sjálvt gera av at yvirtaka ella kann yvirtaka eftir ynski frá ríkisvaldinum. Í § 3, sí lista B, standa nøkur onnur mál og málsøki, sum eftir nærri samráðing kunnu verða flutt heimastýrinum. Eftir § 4 í lógini hevur heimastýrið lóggávuvald og umboðsvald viðvíkjandi teimum økjum, sum hoyra undir heimastýrið, og tær av løgtinginum samtyktu og av landsstýrisins formanni staðfestu lógir verða nevndar løgtingslógir.

Viðurskifti, sum ikki samsvarandi hesi lóg hoyra undir føroyska heimastýrið, verða umsitin sum ríkisins felagsmál av ríkisvaldinum, sbrt. § 6, stk. 1, í heimastýrislógini.

Við heimastýrisskipanini fyri Føroyar vórðu bæði lóggávu- og umboðsvald, sbrt. § 3 í grundlógini, flutt føroysku myndugleikunum í sera stórum vavi.

Tá grundlógin varð samtykt í 1953, varð lagt til grundar og góðtikið, at skipanin, ið heimastýrislógin frá 1948 stovnaði, er sambærilig við grundlógina. Nágreiniliga sambandið hjá heimastýrisskipanini til grundlógina hevur verið eitt kjakevni síðan stovnan heimastýrisins. Summi halda, at talan er um delegatión av lóggávuvaldi, ið kann takast aftur við lóg, sbrt. § 3, 1. pkt., í

grundlógini, meðan onnur halda, at lóggávuvaldið kann ikki broyta heimastýrisskipanina ímóti viljanum hjá føroyskum myndugleikum.

Í tíðarskeiðinum 2002-2005 samráddust føroyska landsstýrið og ríkisstjórnin um føroyska yvirtøku av fleiri málum og málsøkjum. Orsøkin til hetta var, at landsstýrið vildi hava, at føroyskir myndugleikar skuldu yvirtaka mál og málsøki, sum heimastýrislógin frá 1948 ikki fevndi um.

Við lóg nr. 79 frá 12. mai 2005 um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka (lov nr. 578 af 24. juni 2005 om de færøske myndigheders overtagelse af sager og sagsområder) fingu føroyskir myndugleikar víðari ræsur til at yvirtaka mál og málsøki viðvíkjandi føroyskum sermálum. Eftir § 1 og § 2 í lógini kunnu føroyskir myndugleikar yvirtaka øll mál og málsøki uttan stjórnarskipanina, heimarætt, Hægstarætt, uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikk umframt gjaldoyra- og peningapolitikk. Eftir § 3 hava føroyskir myndugleikar lóggávu- og umboðsvaldið á yvirtiknum málum og málsøkjum.

§ 4 í lógini ásetir, at dómstólar, sum føroyskir myndugleikar seta á stovn, hava dómsvaldið á øllum málum og málsøkjum í Føroyum. Sum nú er, hava føroyskir myndugleikar ikki stovnað slíkar dómstólar, tí Føroyar hava enn ikki yvirtikið málsøkið "Rættargangur, heruppií at seta á stovn dómstólar", sí nr. 10 á lista I til lógina.

Í setanarrøðu sínari í Fólkatinginum tann 1. oktober 2002 upplýsti forsætisráðharrin, at ríkisstjórnin hevði verið sinnað at umrøtt um eina skipan, har tað føroyska og tað grønlendska landsstýrið fingu heimild til at virka ríkisins vegna í millumtjóðamálum, ið einans viðvíkja Føroyum ávikavist Grønlandi. Slíkar skipanir høvdu verið uttan fyri karmarnar á táverandi heimastýriskipanum, og ríkisstjórnin var tessvegna sinnað at grundfesta skipanirnar í lóggávu. Samráðingar millum Føroyska landsstýrið og ríkisstjórnina fingu ein lógartekst í lag í 2004 og 2005.

Við lóg nr. 80 frá 14. mai 2005 um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera (lov nr. 579 af 24. juni 2005 om Færøernes landsstyres indgåelse af folkeretlige aftaler) fekk Føroya landsstýrið heimild til at samráðast við fremmand ríki og millumtjóðafelagsskapir og við tey gera altjóðarættarligar sáttmálar, heruppií fyrisitingarligar sáttmálar, ið til fulnar viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, sbrt. § 1, stk. 1 í lógini. § 1, stk. 2-5, ásetir vavið á heimildini. Tað stendur í § 1, stk. 4,

at ásetingin fevnir ikki um altjóðarættarligar sáttmálar, ið víkja at verju- og trygdarpolitikki, ei heldur um altjóðarættarligar sáttmálar, sum skulu galda fyri Danmark, ella sum samráðst verður um í millumtjóðafelagsskapi, har sum Danmarkar kongsríki er limur. Eftir § 1, stk. 5, avmarkar ásetingin ikki stjórnarskipanarliga ábyrgd og heimildir hjá donskum myndugleikum viðvíkjandi tí at samráðast, gera og siga úr gildi altjóðarættarligar sáttmálar, heruppií sáttmálar, sum ásetingin fevnir um.

Eftir § 2, stk. 1, í lógini ger Føroya landsstýri altjóðarættarligar sáttmálar eftir § 1, stk. 1, ríkisins vegna undir heitinum Danmarkar kongsríki Føroyum viðvíkjandi. Tað stendur í § 2, stk. 2, í lógini, at henda lóg treytar tætt samstarv millum donsku ríkisstjórnina og Føroya landsstýri til tess, at heildaráhugamál Danmarkar kongsríkis verða ikki sett til viks, og at ríkisstjórnin verður kunnað um ætlaðar samráðingar, áðrenn farið verður undir tær, eins og samráðingargongdina, áðrenn altjóðarættarligir sáttmálar verða gjørdir ella sagdir úr gildi. Ríkisstjórnin ásetir eftir samráðingar við Føroya landsstýri nærri karmar um samstarvið.

§ 4 í lógini sigur, at eftir áheitan frá Føroya landsstýri kann ríkisstjórnin samtykkja at lata inn umsókn um limaskap Føroya, ella stuðla slíkari, í millumtjóðafelagsskapum, ið loyva øðrum eindum enn ríkjum og felagsskapum av ríkjum limaskap í egnum navni, tá ið tað er sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya.

Sbrt. upplýsingunum í hesum máli varð § 4 lógarinnar sett inn í tann lógartekstin, sum føroyskir og danskir myndugleikar samráddust um í 2004 og 2005. Øðrumegin vildi landsstýrið hava eina áseting í lógini, ið loyvdi føroyskum limaskapi í egnum navni í millumtjóðafelagsskapum, t.d. WTO, meðan ríkisstjórnin hinumegin bar fram, at sum skilst á § 19 í grundlógini fór tað at krevja eina grundlógarbroyting, um Føroyar ríkisrættarliga skuldu fáa loyvi at virka egna vegna í millumtjóðamálum. Burturúr samráðingunum spurdist § 4 í lógini, sum inniheldur ásetingina um, at føroyskur limaskapur í egnum navni skal vera "sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya." Sum skilst á forarbeiðunum til føroysku løgtingslógina (Løgtingsmál nr. 95/2004: Uppskot til lóg um altjóðarættarligu sáttmálar Føroya landsstýris at gera, síða 3) og til donsku lógina (Folketingstidende 2004-05 (2. samling), tillæg A, lovforslag nr. L 171, síða 7969 f.) hava føroyskir og danskir myndugleikar lagt ymiskar fatanir av stjórnarskipanarligu støðu Føroya til grundar í hesum sambandi.

Spurningurin um, hvørt føroyskur limaskapur í egnum navni í millumtjóðafelagsskapum kann vera sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya, varð sostatt ikki avgreiddur millum føroyskar og danskar myndugleikar við § 4 í lógini um altjóðarættarligu sáttmálgerð Føroya frá 2005.

Lógirnar um heimastýrisskipanina kunnu tessvegna ikki metast at vera grundaðar á felags fatan um, hvat stjórnarskipanarliga støða Føroya loyvir, og lógirnar og forarbeiði teirra kunnu sostatt ei heldur veita svar um, hvørt føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO er sambæriligur við stjórnarskipanarligu støðu Føroya. Eins og nevnt omanfyri veldst svar spurningsins um, hvørt ein slíkur limaskapur er sambæriligur við § 19 í grundlógini.

*§ 19 í grundlógini*

§ 19 í grundlógini er soljóðandi:

> "Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender. Uden folketingets samtykke kan han dog ikke foretage nogen handling, der forøger eller indskrænker rigets område, eller indgå nogen forpligtelse, til hvis opfyldelse folketingets medvirken er nødvendig, eller som iøvrigt er af større betydning. Ejheller kan kongen uden folketingets samtykke opsige nogen mellemfolkelig overenskomst, som er indgået med folketingets samtykke.
> *Stk. 2.* Bortset fra forsvar mod væbnet angreb på riget eller danske styrker kan kongen ikke uden folketingets samtykke anvende militære magtmidler mod nogen fremmed stat. Foranstaltninger, som kongen måtte træffe i medfør af denne bestemmelse, skal straks forelægges folketinget. Er folketinget ikke samlet, skal det uopholdeligt sammenkaldes til møde.
> *Stk. 3.* Folketinget vælger af sin midte et udenrigspolitisk nævn, med hvilket regeringen rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenrigspolitisk rækkevidde. Nærmere regler om det udenrigspolitiske nævn fastsættes ved lov."

Í § 19, stk. 1, 1. pkt., í grundlógini stendur, at ríkisstjórnin hevur myndugleikan at virka ríkisins vegna í millumtjóðamálum. Eftir § 19, stk. 1, 2. og 3. pkt., og stk. 2, skal ríkisstjórnin tó frammanundan hava samtykki Fólkatingsins í ávísum førum. Harafturat stendur í § 19, stk. 3, at undan hvørjari avgerð við størri uttanríkispolitiskum týdningi skal ríkisstjórnin leita ráð hjá einari uttanríkispolitiskari nevnd, sum Fólkatingið hevur sett.

Eins og nevnt omanfyri – og sum bleiv lagt til grundar og góðtikið, tá núverandi grundlóg varð samtykt í 1953 – blivu bæði lóggávu- og umboðsvald, sbrt. § 3 í grundlógini, flutt føroysku

myndugleikunum í sera stórum vavi. Føroyskir myndugleikar kunnu eisini stovna dómstólar, ið síðan fáa dómsvald í Føroyum. Føroyskir myndugleikar kunnu harafturat ríkisins vegna samráðast við fremmand ríki og millumtjóðafelagsskapir og við tey gera altjóðarættarligar sáttmálar, ið til fulnar viðvíkja yvirtiknum málsøkjum, og til ber við stuðli frá ríkisstjórnini at fáa limaskap í egnum navni í millumtjóðafelagsskapum, tá ið tað er sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya. Menningin í heimastýrisskipanini hevur verið, at leypandi hevur heimastýrið yvirtikið mál og málsøki í samsvari við politiska viljan frá føroyskari og danskari síðu.

Spurningurin er, um tað er sambæriligt við § 19 í grundlógini, at Føroyar umframt tær sera víðu heimildirnar, ið longu eru fluttar, kunnu gerast limur í egnum navni í WTO.

Eftir orðaljóðinum ásetir § 19, stk. 1, 1. pkt., í grundlógini, at kongur (ríkisstjórnin) virkar ríkisins vegna í millumtjóðamálum. Myndugleikin eftir § 19 í grundlógini er forrættindi hjá ríkisstjórnini, har grundlógin hevur veitt ríkisstjórnini beinleiðis myndugleika at virka ríkisins vegna í millumtjóðamálum.

Vanliga hevur verið mett, at § 19, stk. 1, 1. pkt., í grundlógini hevur við sær, at einstakir partar av ríkinum kunnu ikki fara uttan um ríkisstjórnina og virka í egnum navni í millumtjóðamálum. Um einstakir ríkispartar kundu virka fullkomiliga sjálvstøðugt í egnum navni í millumtjóðamálum, hevði tað kunnað havt við sær, at ymiskir partar av Danmarkar kongsríki fóru uttan um ríkisstjórnina og gjørdu sáttmálar, sum høvdu verið altjóðarættarliga bindandi og fingið gildi ájavnt við innanríkis lóggávu um sambandið millum ríkispartarnar, og møguligar, altjóðarættaligar trætuskipanir høvdu fingið málsførleika millum ríkispartarnar. Harafturat hevði tað kunnað elvt til iva um altjóðarættarliga ábyrgdarbýtið millum ríkispartarnar, eitt nú hvønn part av ríkinum millumtjóðafelagsskapir og onnur ríki halda seg gera altjóðarættarligan sáttmála við.

Metast kann tessvegna ikki, at heimastýrisskipan Føroya hevur skapað eitt altjóðarættarligt subjekt innan fyri Danmarkar kongsríki, ið kann fara uttan um ríkisstjórnina og virka fullkomiliga sjálvstøðugt í egnum navni í millumtjóðamálum.

Tað áðurnevnda má sum meginregla í allarflestu førum metast at vera til hindurs fyri, at ein ríkispartur søkir um limaskap í egnum navni í millumtjóðafelagsskapi. Nógv teir flestu

millumtjóðafelagsskapirnir loyva ei heldur, at ein partur av einum ríki kann gerast limur í egnum navni í felagsskapinum. Í so máta er WTO eitt heilt serstakt føri.

WTO loyvir sostatt, at aðrar eindir enn ríki kunnu fáa fullan limaskap sum sjálvstøðug tollumveldi, sbrt. grein XII, stk. 1, í stovningarsáttmálanum hjá WTO. Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir eru samdir um, at føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO fer at bera við sær, at Føroyar gerast ein sjálvstøðugur limur í WTO sum sjálvstøðugt tollumveldi.

Sambært upplýsingunum í málinum er WTO soleiðis háttað, at eitt ríki og eitt sjálvstøðugt tollumveldi, sum er partur av hesum ríki, eru sjálvstøðugir og javnsettir limir í WTO. Sambært upplýsingunum í málinum merkir hetta m.a., at sum limir í WTO skulu ríki og tollumveldi hvør í sínum lagi halda sáttmálarnar hjá WTO, og tað eru einans ríkið ella einans tollumveldið, ið av triðjalandi kunnu klagast fyri trætuskipanini og fáa eina avgerð um seg, sum ráðið fyri trætuskipanini samtykkir. Tað eru einans ríkið ella einans tollumveldið, sum kunnu ábyrgjast. Ríkið, ið eitt klagað tollumveldi er partur av, ella tollumveldið, sum er partur av einum klagaðum ríki, gerast sostatt ikki partar av trætumálinum í WTO. Danmark verður sostatt ikki partur í møguligum trætumáli, sum er lagt móti Føroyum í WTO, og Føroyar gerast ikki partur í møguligum trætumáli, ið er lagt móti Danmark ella ES í WTO. Avgerðir millum limir í skipanini hjá WTO hava ikki rættarvirknað uttan fyri skipanina hjá WTO, og tað ber ikki til sambært reglunum hjá WTO at taka ella handhevja avgerðir uttan fyri skipanina hjá WTO, t.d. í einum altjóða dómsstóli.

Teir av ríkisstjórnini og landsstýrinum valdu limirnir hava harumframt upplýst, at føroyskur limaskapur í egnum navni í WTO fer ikki at hava rættarligan týdning fyri rættindi og skyldur Danmarkar sum limur í WTO ella í aðrar mátar stjórnarskipanarligu støðu Danmarkar, eitt nú samband Danmarkar til onnur ríki og millumtjóðafelagsskapir.

Sambært upplýsingunum frá nevndarorðaskiftinum fer tað, áðrenn Føroyar møguliga gerast limur í egnum navni í WTO, at bera til at staðfesta millum Føroyar og Danmark, hvussu innanhýsis sambandið millum Føroyar og Danmark í mun til WTO skal handfarast gjøllari.

Tey mótmæli av prinsipiellum og verkligum slagi, ið eru nevnd omanfyri, og sum koma í, um ein ríkispartur verður limur í egnum navni í millumtjóðafelagsskapi, eitt nú viðvíkjandi galdandi,

altjóðarættarligum skyldum millum ríkispartarnar og altjóðarættarliga ábyrgdarbýtinum, kunnu orsakað av teimum serligu, omannevndu viðurskiftunum ikki sigast at gera seg galdandi viðvíkjandi føroyskum limaskapi í egnum navni í WTO. Mótmælini fara tí ikki at vera til hindurs fyri, at Føroyar – um Føroyar fáa loyvi til tess frá ríkisstjórnini, sí § 19 í grundlógini og somuleiðis eisini § 4 í lógini frá 2005 – gerast limur í WTO í egnum navni sum sjálvstøðugt tollumveldi.

§ 19, stk. 3, í grundlógini sigur, at undan hvørjari avgerð við størri uttanríkispolitiskum týdningi skal ríkisstjórnin leita ráð hjá einari uttanríkispolitiskari nevnd, sum Fólkatingið hevur sett. Um Føroyar gerast limur í WTO í egnum navni sum eitt sjálvstøðugt tollumveldi, kann tað hugsast, at ein spurningur fer at stinga seg upp hjá ríkisstjórnini um at leita ráð í sambandi við avgerðir, sum viðvíkja føroyskum limaskapi. Í verki verður hetta neyvan hugsandi, men um so er, má tað handfarast innan vanligu skipanina um parlamentariska ábyrgd.

*Niðurstøða*

Grundað á tað omannevnda er tað eftir okkara tykki sambæriligt við stjórnarskipanarligu støðu Føroya, um Føroyar fáa loyvi frá ríkisstjórnini, sbrt. § 19 í grundlógini, til at gerast limur í WTO í egnum navni sum eitt sjálvstøðugt tollumveldi.

10. septembur 2025

Jens Peter Christensen
(formaður)

Lars Hjortnæs

Jens Kruse Mikkelsen